


## Minni til góða enn mett

Trotabúgvið eftir Vinnuvitan og Vikublaðnum verður gjørt upp í hesum døgum. Krøvini higartil frá kreditorum eru 9,5 til Vinnuvitan og 4,1 millión krónur til Vikublaðið. Tá eru lønarkrøvini til Vinnuvitan enn ikki komin. Størsti einstaki kravánarin er Eik Banki, sum hevur kravt Vinnuvitan eftir átta milliónum krónum. Eik hevur partvíst veð í bygninginum hjá Dimmalætting fyri hesi skuldini. Tað visti Kringvarpið at siga í gjár. Men nú vísir tað seg, at skuldin er størri enn so. Útvarpið hjá Kringvarpinum visti í morgun at siga, at hvørki Vinnuvitan ella Vikublaðið eiga so nógv til góða hjá sínum viðskiftafólkum, sum bókhaldini vilja verða við. Tað pástanda viðskiftafólkini í hvussu er. Hetta hevur ført til, at stjórin í trotabúðnum hevur sett ágóðan hjá bløðunum úr tilsamans 3,8 milliónum niður í 1,5 milliónir krónur.

# rðast munandi



*Nógvar av hesum slagnum eru í Føroyum. Frá 1. juli skulu allar slíkar, sum verða nýttar á støðum umfatað av ferðslulógin skrásetast*

## Motoramboð skulu skrásetast

Í einum uppskoti til kunngerð, ið er tengt at nýggja lógaruppskotinum, er eitt serliga áhugavert. Í uppskotinum til kunngerð stendur at »Motoramboð, ið er gjørt og verður nýtt til flutning av farmi, ið ikki er neyðugur til tess, at motoramboðið skal virka, skal skrásetast og hava nummarspjaldur, áðrenn tað verður tikið í nýtslu á øki, sum ferðslulógin fevnir um. Slíkt mororamboð kann tó uttan skráseting verða nýtt á privatum øki, heruppií privatum veg, ið ikki er at meta sum privatur felagsvegur, og kann eisini í lítlan mun verða nýtt á privatum felagsvegi og almennum vegi, t.d. fara tvørtur um veg«

Her er talan um eitt nú tær fýrhjólaðu motorsúkklurnar, All-Terrain-Vehicles, ið nógv hava fingið sær hendur á í seinastuni. Nú skulu øll hesi, ið ikki verða nýtt á støðum, ið ferðslulógin ikki umfatar, burturav, skrásetast og hava nummarspjaldur.



*Frá 1. juli skulu øll ferðandi í bili verða spent í trygdarbelti*

## Øll skulu sita í trygdarbelti

Í nýggja uppskotinum verður eisini sett í lógina, at framyvir skulu øll ferðandi í bili sita í trygdarbelti. Soleiðs sum lógin var áðrenn, segði hon at øll tey, ið høvdu møguleika fyri at sita í trygdarbelti, skuldi sita íbundin. Men nú verður hetta eisini hert. Framyvir verður ikki loyvi at hava fleiri ferðafólk í bilinum, enn tað eru trygdarbelti.

Somuleiðis verður heldur ikki longur loyvt at hava ferðafólk í last- ella viðførisrúmi í akfari.

Um aðrar broytingar kann nevnast, at børn kunnu ikki verða flutt í bili í barnastóli, ið vendur aftureftir, á einum sæti, sum hevur stoytkodda frammanfyri, um ikki stoytkoddin er gjørdur óvirkin.

Harafturat verða onnur herd krøv eisini sett til trygdarútgerð til børn.

## Sláa hart niður á lógbrótarar

Ein broyting er, at revsingin fyri millum annað brot á reglurnar um koyring ávirkaður av rúsdrekka ella rúsevnum verða herdar, og skal revsiramman viðvíkjandi broti á reglurnar samsvara revsirammuni fyri rúsdrekkakoyring. Undir herðandi umstøðum kann revsingin hækka upp til fongsul í 1 ár og 6 mánaðir, móti higartil 1 ár.

Herðandi umstøður eru millum annað um alkoholstyrkin í blóðinum fer upp um 2,0 promilluellasamsvarandi 1,0 mg pr.litur luft í útandingarluft.

Frádømingartíðin verður eisini longd. Áðrenn var minsta tíðarskeið 2 ár og 6 mánaðir, um promillan var omanfyri 2,0. Nú er minsta tíðarskeið 3 ár, um promillan er omanfyri 1,20 promillu.

Frádømingin kann verða gjørd fyri alla tíð, um førarin undir koyringini hevur framt groft koyrimistak, elvt til álvarsaman persónsskaða og um upplýsingar eru um brot, sum førarin áður hevur framt á ferðslulógina, at ein frádøming av førararættinum fyri alla tíð verður mett neyðug við fyriliti fyri ferðslutrygdini og rættarverjuni.

Ein onnur broyting er eisini, at sektirnar á ferðslulógarøkinum verða hækkaðar og gjørdar einfaldari soleiðis, at tær skulu kunna býtast við 500 kr. Sostatt verður talið á gjøldum, sum talan kann verða um, minkað munandi.